## Óbroyttur laksafiskiskapur

Við støði í vánaligu støðuni, sum laksastovnarnir sum heild eru í, varð samtykt ikki at áseta nakra kvotu fyri føroyskan sjógv, tá 24. ársfundurin hjá NASCO var á skránni fyrst í juni. Men taka føroyskir myndugleikar avgerð um at loyva fiskiskapi í føroyskum sjógvi, skulu Føroyar boða NASCO frá hesi avgerð, so NASCO fær møguleika at viðgera føroysku avgerðina í skundi, sigur Fiskimálaráðið í tíðindaskrivi. Føroyar átalaðu, at onnur lond framhaldandi loyva laksafiskiskapi í árum, sum eru illa fyri, samstundis sum somu lond arbeiða ímóti laksafiskiskapi í føroyskum sjógvi.



## Abbin og úlvarnir

Kendi svenski rithøvundurin, Per Olov Enquist, hevur skrivað eina barnabók, sum hann av fyrstan tíð als ikki ætlaði skuldi verða útgivin. Tá ið bókin kom út í Svøríki, segði hann í samrøðu við svenska Aftonbladet, at bókin í grundini var ein jólagáva. Hon var skrivað um upplivingarnar um summarið og prentað í fýra eintøkum, og ætlanin var at geva abbabørnunum hvør sína í jólagávu. Bókin er um Minu, sum altíð er so bangin, tá hon vaknar, tí hon droymir um eina óhugnaliga krokodillu. Abbin sigur, at hon má gera okkurt passaliga vandamikið fyri at vinna á ræðsluni, og tí fara øll abbabørnini saman við abbanum eina rannsóknarferð.

# Tú mást vilja politikkin

**Tú skalt hava nakað uppá hjarta, og seta tær nøkur politisk mál. Og so skalt tú hava ein brennandi vilja til at fáa málini ígjøgnum. Hetta var niðurstøðan á kvinnufundi hjá Fólkaflokkinum leygardagin**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Seinnapartin leygardagin skipaði Fólkaflokkurin fyri tiltaki, har tær báðar Henriette Kjær og Pia Christmas-Møller úr Konservativa Fólkaflokkinum í Danmark greiddu frá, hvussu tær hava borið seg at við at koma fram í politikki.

- Tú mást fyrst og fremst hava ein sterkan vilja um at arbeiða við tínum egna politikki. Tí er eisini alneyðugt, at tú setir tær nøkur mál, sum tú so fylgir, sigur Rúna Sivertsen, tá hon verður spurd, hvat hon ítøkiliga fekk burtur úr fundinum. Eisini sigur hon, at tað enn einaferð varð staðfest, at endamálið er ikki at troka menninir av rókini, men at koma inn og fáa títt egna ígjøgnum.

Sum hon hevur sagt fyrr, so halda kvinnur ofta, at tær skulu vita alt um alt, fyri at bjóða seg fram.

- Men tað skalt tú als ikki. Tú skalt fylgja við og vita eitt sindur um alt. Og so skalt tú savna teg um ávís hjartamál, sum tú fert í dýpdina við, sigur Rúna Sivertsen, sum serliga helt tað vera spennandi at hoyra Pia Christmas-Møller, tí hon fortelur á ein sera dynamiskan og livandi hátt.

### Bjóða teg fram

Eitt nú greiddi hon frá, at málið hevur onki við menn at gera. Málið er at koma inn og at fáa sítt ígjøgnum.

- Ein og hvør broyting fer fram millum oyruni. Tú mást seta tær eitt ávíst mál og brenna fyri tí. Kvinnur bíða ofta til onnur fáa eyga á tær. Men tað nyttar onki at goyma seg. Vilt tú fram, so mást tú eisini bjóða teg fram, segði Pia Christmas-Møller. Bæði Henriette Kjær og Pia Christmas-Møller eru uppvaksnar í politiskum heimum, og gjørdust politiskt virknar longu sum blaðungar.

Rúna Sivertsen sigur, at tær báðar hava ikki skapað sær nakað beinleiðis netverk, sum stuðlar upp undir politisku karrieruna. Men at hetta er tilvitað, tí tær vilja heldur nýta orkuna heima.



*- Ein og hvør broyting fer fram millum oyruni. Tú mást seta tær eitt ávíst mál og brenna fyri tí. Kvinnur bíða ofta til onnur fáa eyga á tær. Men tað nyttar onki at goyma seg. Vilt tú fram, so mást tú eisini bjóða teg fram, segði Pia Christmas-Møller*

*Mynd: Regin W. Dalsgaard*



*Eini 30 fólk møttu til fundin, sum var á Hotel Tórshavn. Harímillum vóru eisini nakrir menn*

*Mynd: Regin W. Dalsgaard*

### Óvissa um uppstilling

Eini 30 fólk møttu til fundin, sum var á Hotel Tórshavn. Harímillum vóru eisini nakrir menn.

- Ongin ivi er um, at vit hava fleiri dugnaligar kvinnur í fólkaflokkinum. Men eg veit ikki, um tær eisini hava hug at stilla upp, sigur Rúna Sivertsen, sum enn ikki hevur tikið støðu til, um hon sjálv stillar upp til komandi valg.

## Svenskir fjølmiðlar flest kvinnur

**Onga aðrastaðni í heiminum eru so nógvar kvinnuligar keldur í miðlunum enn í Svøríki**

JAVNSTØÐA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sagt verður, at altjóða miðaltalið á kvinnuligum keldum á bløðum, útvarpi og sjónvarpi er 20 prosent, men í Svøríki er hetta miðaltalið 30 prosent.

Hetta vísir kanning, sum Global Media Monitoring Project hevur gjørt í 71 londum, har kannað var, hvussu nógvir menn í mun til kvinnur sleppa framat í miðlunum. Sostatt liggur Svøríki á odda í kanningini, har tríggjar av tíggju keldum í svenskum blaðgreinum ella sjónvarpsinnsløgum eru kvinnur. Í restini av heiminum fáa bert tvær kvinnur orðið, hvørja ferð átta menn sleppa framat í fjølmiðlunum.

Um hugt verður eftir heimspørtunum liggur Norðuramerika klárt á odda, meðan Europa liggur í miðjuni, og Miðeystur er í botni. Danmark hevur ikki verið við í kanningini, men ein kanning av donskum miðlum fyri stuttum vísti, at danska kvinnuumboðanin í miðlunum líkist altjóða miðaltalinum.

Göteborgs-Posten (GP) var eitt av bløðunum í kanningini. Har stigur blaðstjórin Jonathan Falck, at GP ætlar at vera fremst í Svøríki, tá tað umræður um at lýsa bæði menn og kvinnur.

- Tað er alt ov lætt at ringja til ein mannligan serfrøðing av dovinskapi, bara tí hann er spurdur fyrr, sigur Falck. GP hevur sett eitt fólk, sum burturav skal kanna javnstøðuna, og hvønn dag mátar kvinnu- og mansumboðanina í tekstum og myndum. - Hetta økir avgjørt um tilvitanina um kynsligu umboðanina, heldur Falck.